## Skjótasti svimjarin í landinum

Pauli Øssurson Mohr setti leygardagin føroyskt met á 50 metra frí. Samstundis svam hann seg til luttøku í europiskari meistarastevnu. Pauli Ø. Mohr svam í morgun 50 frí í tíðini 23.74, sum er nýtt føroyskt met og undir kravtíð til evropeisku meistarastevnuna í Prag. Tað skrivar heimasíðan www.svimjing.com. Pauli átti sjálvur metið á 23.96, frá kapping í Vági í mars mánaði.



## Hughes minnist Føroya-ferð

Europiska ævintýrið hjá Manchester City er av á hesum sinni, eftir at Manchester City hóskvøldið mátti lúta samanlagt móti týska Hamburger SV. Mark Hughes, sum er manager í felagnum, iðrar seg sjálvandi um, at felagið ikki longur er við í UEFA-Cup kappingini, men á heimasíðu felagsins sendir hann eina tøkk til áskoðararnar. Ikki minst teir, sum treiskaðust seinasta summar, tá lítla EB/Streymur var fyrsta forðingin hjá Manchester City. - Ja, nakrir teirra royndu enntá at koma til Føroya við at leiga eitt fiskiskip, og tað vísir, hvussu stórur stuðul okkara frá áskoðarunum er, sigur Mark Hughes við heimasíðuna.

AB-ÍF 2-0 (1-0):

# Gongur einki hjá fuglfirðingum

**Fuglfirðingar tosaðu um gullmerki undan kappingarbyrjan, men eftir trý umfør stendur null á stigaúrtøkuni. AB vann sær í gjár síni fyrstu stig í hesum kappingarárinum**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

*AB*

*ÍF*



*Fuglfirðingar hingu við høvdinum, tá teir fóru av vøllinum á Argir. Trý tap í trimum teimum fyrstu dystunum er ikki júst tað, sum styrkir vónirnar um heiðursmerki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Málsetningurin er at vinna greipuna.

So avgjørdur var Jón Simonsen, høvuðsvenjari hjá ÍF, í samrøðu við bláabylgjan.com í vetur. Fuglfirðingar stíla høgt, men tvær vikur eftir kappingarbyrjan hava teir framvegis ikki lagt frá landi.

ÍF tapti í gjár fyri triðju ferð upp í slag, tá liðið vitjaði á Argjum. Sigurin var væl uppiborin, at stríðshugaðu argjamenninir tryggjaðu sær síni fyrstu stig í Vodafonedeildini.

### Uppiborin sigur

AB hevði lagt røttu ætlan fyri dagin. Tað tóktist, sum heimaliðið legði nógv fyri at fáa mál fyrstu løtuna, fyri síðan at flyta liðið longur aftur á vøllin. Og tað eydnaðist. Teir fingu leiðslu málið tíðliga, og komandi tíman av dystinum royndu gestirnir úr Fuglafirði at trýsta. Men á hálvuni hjá argjamonnum vóru teir ongantíð vandamiklir, men Heðin Stenberg, málverji, hevði tamarhald á støðuni, tá hann var settur undir trýst.

Eftir hvíldina løgdu leikararnir væl meira fyri í nærdystunum, men framvegis kundu málmøguleikarnir teljast á einari hond. ÍF royndi alsamt at trýsta seinastu løtuna, og tað kostaði í hinum endanum.

Sandoyingurin Rasmus Nielsen og havnarmaðurin John Hansen, sum skifti til AB í vetur, vóru málskjúttarnir hjá heimaliðnum. Nielsen legði uppflytarnar á odda eftir einum korteri, tá hann slapp ígjøgnum í vinstru, og hegnisliga snýtti tveir mótstøðuleikarar. Einsamallur við málverjan var hann tryggur.

Miðvallarin John Hansen økti um leiðsluna, tá fýra minuttir vóru leiktir av tíðini, dómarin hevði lagt afturat. Í skjótálopi sendi Jónas Stenberg til Hansen úr vinstru, sum staðfesti sigurin. Tað var fyrsta málið hjá miðvallaranum í bestu føroysku fótbóltsdeildini.

### Rættar loysnir

Hópurin hjá AB sær áhugaverdur út. Á vongverja plássunum røkja Janus Joensen og Kenneth Jacobsen plássini, og tað gevur tryggleika til Rasmus Nielsen og Dion Splidt, sum í gjár spældu í síðunum. Ungir leikarar hava ofta sveiggj í sínum avrikum, og tá er umráðandi at hava mans, sum avrika hvørjaferð.

Argjamenn fingu í gjár síni fyrstu stig í fyrstu royndini á heimavøllinum. Tað er umráðandi at geva signal, at á Argjum ræður AB. Og við einum uppibornum 2-0 sigri eydnaðist tað í gjár.

Fuglfirðingar hava lagt óneyðugt trýst á seg sjálvar. Við tilgongdini av eitt nú Rógva Jacobsen var gjørt greitt, at ÍF skuldi í oddastríðið. Tað skal málsetningurin altíð vera, men tað kann tykjast vera ein vansi at siga alment. Fuglfirðingar er púra óvandir í stríðnum um heiðursmerki, og tað hevði verið stuttligari í hópinum, um teir kundu lopið hvøkk á fólk. Í hópinum er tað einans Rógvi Jacobsen, sum av álvara hevur stríðst um gullmerki áður í fleiri ár upp í slag. Komandi vikuskiftið vitjar B68 í Fuglafirði. Og skjótt mugu stigini koma í hús.

## Vendi ongum einsamallur

Rógvi Jacobsen mátti hyggja frá síðulinjuni, tá liðfelagarnir taptu uppiborið móti AB í gjár. ÍF hevur framvegis síni fyrstu stig til góðar, men landsliðsleikarin staðfestir, at hann ikki vendir gongdini einsamallur.

- Tað er ongantíð stuttligt at síggja sítt lið tapa. Eg gleði meg at sleppa aftur á vøllin og vónandi fer tað at eydnast okkum at fáa stig skjótt. Og tað fara vit at gera sum eitt lið, sigur Rógvi Jacobsen, sum seinastu vikuna er byrjaður at renna aftur eftir drúgva skaðasteðg. Og sum klaksvíkingurin staðfestir, ansar hann væl eftir, tí tað er býtt at byrja ov tíðliga.

## Simonsen var vónbrotin

- Sjálvsagt eri eg vónbrotin um úrslitið.

Tað segði Jón Simonsen, venjari hjá ÍF, eftir dystin á Argjum í gjár. Hann staðfestir, at tað var torført at spæla móti verjukendu argjamonnunum.

- Teir leggja seg á odda eftir einum korteri og flyta síðan liðið aftur á vøllin. Vit hava ikki hugflog til at skapa vandamiklar støður. Móti endanum royna vit ymiskar loysnir, millum annað við útskiftingum, men tað kostar í hinum endanum, sigur Jón Simonsen, sum væntar, at stigini skjótt koma til høldar.

## Argir er okkara borg

- Vit spældu á Argjum, og her eru vit sterkastir. Vit standa væl í verjustøðu, og tað er høvuðsorsøkin til uppiborna sigurin.

John Hansen, annar av málskjúttunum hjá AB, royndist væl á miðvøllinum í gjár. Hann staðfestir, at Allan Mørkøre, venjari, hevði rætta uppleggið.

- Vit flyta okkum longur aftur í seinna hálvleiki og dúva á mótálop. Fuglfirðingar eru nógv á bóltinum, men ongantíð vandamiklir. Vit hava prógvað, at øll liðini fáa tað trupult á Argjum í ár, sigur John Hansen, sum frøist um fyrstu stigini.

- Fyrst og fremst er málið at sleppa undan niðurflyting, men sjálvsagt hava vit sett nøsina upp móti meira. Við spælinum í dag kunnu vit væl enda í miðjuni av stigatalvuni, slær John Hansen fast.